vegin móttøkuna, og tað sama gjørdu teir á Austfirðingi, sum beinanvegin vendu aftur. Tá var ein tími farin, síðan skipini hittust.

Axel hevði víst dugnaskap og dirvi, tá ið hann var við í Egil Rauða forlissinum, og tað sama gjørdi hann í hesum førinum, tá stór ábyrgd varð løgd á hansara herðar at hava sambandið við bjargingarfólkini.

Vónirnar um bjarging vóru góðar. Tað sást jú ljós frá bygdum á landi og vóru hesar ikki so langt burtur heldur.

Minni hugaligt var at hoyra, hvussu tað hvein í botninum á skipinum, tá ið tað rørdi seg og skavaði móti skerinum. Afturat tí lupu plankar úr dekkinum av somu orsøk.

## Mistu bjargingarbátarnar

Farið varð til bjargingarbátarnar at fáa teir settar á sjógv. Men meðan teir loysa annan teirra kom eitt óløgi, sum sleit bátin leysan. Teir mistu bátin, hann holvdist, fanglínan slitnaði, so var hann burtur. Tað gekk ikki stórt mætari við hinum bátinum. Tískil misti teir báðar bjargingarbátarnar, sum teir høvdu. Hetta var eitt øgiligt vónbrot. Samstundis skiltu teir, at skipið fór ikki at halda leingi at standa og rilla á Flesjunum.

Teir sendu neyðrakettir við jøvnum millumbili, og skjótt sóust tvey skip. Tá fóru teir at rigga til at skjóta línu til teirra. Men tað var ov langt burtur, og línan kom ikki fram.

Meðan hetta fór fram, fór manningin á Góðanes at loysa bjargingarflakan, sum teir framvegis høvdu eftir. Flakin varð bundin í stavnin á trolaranum, men tá fór skipið at søkka aftan. Menninir máttu bjarga sær upp á brúnna, og har máttti øll manningin troðka seg saman. Nú var tað ómøguligt at koma framat flakanum. Hann sleit skjótt og fór sama veg sum bjargingarbátarnir.

Axel var framvegis virkin í telegrafistarúminum. Tað kom nú væl við, at teir vóru væl útgjørdir við eykabattaríum, so teir ikki mistu streymin til sendaran.

Nú varð avrátt, at Austfirðingur skuldi royna at koma so nær, at tað bar til at senda bjargingarlínu umborð á Góðanes. Manningin fylgdi við í spenningi, men eingin lína koma nærindis Góðanes. Hóast hetta vóru menninir róligir og royndu at eggja hvønn annan.

## Vesturhavið Blíða kom væl við

Fyrsta skipið á staðnum var Vesturhavið Blíða við Jákup Andreas Vang sum



*Telegrafisturin Axel Oskarsson fekk seg royndan við tveimum forlissum. Fyrst við Egill Rauða og síðan við Góðanes. Var so framskygdur at hava nóg mikið av battaríum til radiostøðina.*



*Jacob Andreas Vang var skipari á Vesturhavinum Blíða. Tá teir komu á Reykjavík stutt eftir vórðu teir móttiknir sum hetjur*



*Skiparin Petur Hafsteinn Sigurðsson. Eftir hann sat unnusta við barni á fyrsta ári. Var eisini við Egill Rauða*

skipara. Hetta var fyrsti stállínuskipið í flotanum, og teir vóru júst komnir til Føroya. Tað hjálpti nógv, at millum ta nútímnas útgerð, sum Vesturhavið hevði, var ljóskastari, sum kom sera væl við í myrkrinum. Hitt skipið var Rókur hjá Skipafelagnum.



*Hetta eru Flesjarnar, har Góðanes sigldi á. Radarendurskinið kom seinni, sum úrslit av hesi vanlukku.*

Avrátt varð, at Rókur skuldi fara inn til Runavíkar at læna bjargingarútgerð frá týskum trolarum, sum lógu har. Meðan Rókur var burtur komu alsamt fleiri skip og bátar á staðið.

Tað føldist leingi, áðrenn Rókur var aftur um midnáttina, men tá hevði hann við sær línubyrsu, línu og bjargingarstól. Ímeðan var støðan versnað umborð á Góðanes. Ein av dekkarunum sigur, at tað einasta, sum stóð uppúr sjónum, var brúgvin. Allir rútar vóru brotnir, og manningin var bæði køld og vát. Men kortini merktist ikki ræðsla á monnunum.

## Eydnaðist at fáa línu umborð

So skjótt, sum Rókur við skiparanum Rubek Rubeksen kom aftur, varð roynt at skjóta línu yvir á Góðanes. Fyrsta skotið miseydnaðist, men tað gekk betri við tí næsta. Tað kom beint í brúnna, og tá fekk manningin fatur í línuni. Tá fór at lætna hjá monnunum. Skjótt var klárt hjá fyrsta manninum at koma í bjargingarstólin. Tá var klokkan fimm á morgni, og átta tímar vóru lidnir, síðan Góðanes strandaði. Nakrir av manningini á Austfirðingi vóru umborð á Róki at hjálpa til. Teir høvdu eisini samband við Axel, fjarritaran, umvegis telefonina hjá Róki til síðstu løtu.

Síðan fóru teir ein fyri og annar eftir í stólin, hetta gekk væl. Roynt var at fáa teir smáu bátarnar, sum kundu koma nærri Góðanes, at taka menninir upp fyri at lætta um bjargingina. Mennninir vóru so av bátunum fluttir umborð á Rók, Thorshavn hjá Ríkisumboðnum og Vesturhavið Blíða. Hetta riggaði eisini væl. Klokkan hálvgum sjey vóru tó enn nakrir menn umborð á Góðanes. Tá breyt meira uppá skipið, tí tá var háflóð. Skipið brotnaði tá eisini í helvt. Nú gav skiparin boð um, at tveir mans skuldu fara í stólin í senn. Men tá kom eitt óløgi og skolaði annan mannin úr stólinum. Hann helt tó fast um stólin, meðan drigið varð. Axel var tann seinasti sum bjargaðist, og tá fossaði sjógvurin inn gjøgnum stýrhúsrútin. Sjálvur slapp hann út gjøgnum dyrnar á stýrihúsinum bakborðsmegin, og hann kláraði at svimja til tann nærmasta bátin. Teir seinastu vórðu tiknir upp úr sjónum, og vóru teir í bjargingarbelti. Ein hevði fingið snudd í høvdið.

## Ein maður saknaður

Tá ið manntal varð hildið aftaná, var ein maður saknaður, og tað var skiparin Pétur Hafsteinn. Teir smærru bátarnir royndu til fánýtis at leita eftir honum. Petur hevði fyrst og fremst hugsað um at bjarga síni manning, og nú var hann sjálvur sjólátin. Tað seinasta sum sást til hansara var beint áðrenn skipið sakk, og var hann tá við at skera leysa eina boyu, sum var føst í einum blokki í bjargingarstólinum.

Beint áðrenn deadline fingu vit at vita eitt dømi um umsorganina hjá skiparanum. Anthon Petersen úr Runavík var kokkur við Góðanes. Hann var tí lætt klæddur, og var tí verri fyri enn hinir. Men skiparin lat Anthon fáa sína ulpu! Anthon er deyður, men hetta hevur familjan hjá honum ikki gloymt skiparanum. Ulpan hevur í hvussu er inntil fyri kortum verið í varðveitslu heima hjá Anthon.

## Góð móttøka í Havn og Reykjavík

Tey nevndu skipini, sum høvdu luttikið í bjargingini, sigldu til Havnar við manningini, og her var stór mannamúgva savnað, sum vildi vísa hesum fiskimonnum samhuga. Síðan var farið á sjómansheimið, har teir fingu klæðir, og har alt var gjørt fyri teir, sum kundi gerast. Í Havn varð flaggað á hálvari stong. Øll bjóðaðu sær til at hjálpa so ella so. Manningin fekk annars til ráð at fara til sjós aftur sum skjótast. Tað vildi gera tað lættari at sleppa burtur úr hvøkkinum. Hetta gjørdu eisini nógvir av teimum.

Manningin fór til Íslands við Austfirðingi kvøldið eftir forlissið.

Íslendingar vístu eisini takklæti fyri hjálpina teir fingu úr Føroyum. Hetta kom Vesturhavið Blíða at merkja. Teirra fyrsti túrur, sum var undir Íslandi, kundi eins væl blivið teirra síðsti, tá teir fingu um skrúvuna.

Tann, sum hevur áhuga fyri hesum, kann finna hesa søgu á heimasíðuni hjá fiskimannafelagnum, blað nr. 284.

Í hesum sambandi komu teir á Reykavík og vóru móttiknir sum hetjur fyri sín leiklut við Góðanes.

Íslendska slysavarnarfelagið vísti eisini sítt takklæti við at geva Føroya Fiskimannafelag eina fullfiggjaða bjargingarútgerð. Hetta gjørdist birtanin til stovnan av bjargingarfeløgum kring landið, og fleiri teirra eru um tað lagi at vera 50 ár.

Í sjómannadegnum sama ár handaði kvinnudeildin í slysavarnarfelagnum í Neskaupstaði føroyingum eitt takkarskjal fyri bjargina.

Sjálvur havi eg eisini fleiri ferðir havt vitjan av íslendskari manning á Góðanes, sum hava takkað fyri innsatsin í 1957.

Eitt annað ítøkiligt úrslit av hesi vanlukku var, at radarendurskin varð sett á Flesjarnar.

## Lagnufelagsskapur millum føroyingar og íslendingar

Sum sagt verður hátíðarhald á Strondum sunnudagin, har tað fyrst verður gudstænasta í Sjóvar kirkju kl. 11, og minningarsteinur fyri skiparan verður avdúkaður við minnisvarðan kl 15. Aftaná verður drekkamunnur í missiónshúsinum á Strondum.

Úr Íslandi koma átta gestir til minningarhaldið, og er hetta fyrst og fremst ættin hjá skiparanun. Millum onnur sonur hansara, sum var nýføðingur tá ið pápin fórst.

Júst hendan hending er enn eitt dømi um lagnufelagsskapin millum føroyingar og íslendingar. Sjálvur havi eg verið við til fleiri minngarhald í Íslandi í sambandi við slíkar vanlukkur, sum hava kravt nógv føroysk mannalív. Vit hava altíð verið væl móttikin í Íslandi, eisini í samband við slíkar hendingar. Tí skulu íslendsku gestirnir vera sera vælkomnir, nú teir eru her í somu ørindum.

Vit koma væntandi í komandi viku at hava frásøgn frá minningarhaldinum, og tá verður helst eisini meira at frætta um hesa hending.

*Keldur:*
*Sjómannadagsblað Austurlands 2007*
*FF-blaðið*